# Lærarastarv
## í Vágs skúla

Í Vágs skúla er eitt tíðaravmarkað lærarastarv at søkja frá 1. september 2006 til 30. juni 2007 við umleið 25 tímum um vikuna fyri lærara í farloyvi.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1-27.4.

**Umsøkjarin skal kunna átaka sær:**
- Danskt 5. fl.
- Rokning 3. fl.
- Stuðul í føroyskum í 4. og 5. fl.
- Serligan tørv í 1. fl.
- Bókasavn

**Søkt verður eftir lærara, sum**
- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skal undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans.
- Duga at samstarva og er fyrkomandi
- Er fúsur at taka á seg tær uppgávur, sum eru í skúlanum
- Er stundisligur og nærlagdur.

**Førleikakrøv:**
Lærarаútbúgving ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum.

**Umsóknir**
Umsóknir við c. v. og ljósriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera skúlastjóranum í hendi í seinasta lagi 24. august kl. 12.00.

Nærri kunning um størvini fæst við at ringja til Óla í Hjøllum, skúlastjóra, á tlf. 373192 ella 374066.

*Vágs skúli hevur komandi skúlaár umleið 240 næmingar í 4 flokkum. Í skúlanum fara at starvast 27 lærarar.*

# Lærarastarv í Hósvíkar skúla

Søkt verður eftir einum lærara til tíðaravmarkað starv skúlaárið 2006/07 vegna avlopstímar, uml. 10 tímar um vikuna. Endaliga tímatalið verður ásett í september.

**Tann, ið settur verður skal:**
- Undir ábyrgd leiðslunar og í samstarvi við lærarar skúlans undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- Duga at samstarva og vera fyrikomandi
- Vera fúsur at taka á seg tær uppgávur og avbjóðingar, ið eru á skúlanum
- Vera við til áhaldandi at menna skúlan

**Førleikakrøv:**
Tann, sum settur verður, skal hava læraraútbúgving. Ynskiligt er, at umsøkjarar hava starvsroyndir í fólkaskúlanum.

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið er lønt í lønarflokkunum 18.1-27.4 sambært avtalu millum Fìggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Umsóknir:**
Umsóknir við c.v. og avriti av prógvum og møguligum viðmælum skluu vera skúlaleiðaranum í hendi í seinasta lagi mánadagin 14. august kl. 12.00.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Eydnu Midjord, skúlaleiðara á tlf. 422259, 422526 ella 220803.

*Hósvíkar skúli hevur komandi skúlaár uml. 43 næmingar og 4 lærarar. Skúlin er 3-flokkaður við næmingum ið ganga í 1. til 7. flokk. Skúlin heldur í løtuni til í tveimum bygningum.*

# Sølufólk

Søkt verður eftir sølufólki – kvinnu ella manni til timburdeildina hjá Sandavágs Timburhandli. Sandavágs Timburhandil er ein timburhandil í stórari menning. Timburhandilin er nú eisini farin at smíða lyklaklár hús og veita heildartænastur til kundan. Til hetta endamál søkja vit eftir fólki, ið kann standa á egnum beinum og taka sjálvstøðugar avgerðir. Tað er umráðandi at viðkomandi persónur eisini kann vera við til at menna konseptið.

**Arbeiðið umfatar:**
- Sølu av lyklaklárum húsum
- Søla av tilfari til sethús, ídnaðarbygningar o.t.
- Marknaðarføring av Sandavágs Timburhandli
- Tilboð
- Innkeyp
- Strutttíðar eins og langtíðar tilrættislegging »Strategi«

Vit bjóða eitt spennandi umhvørvi, eitt starv, sum er sera fjølbroytt, eitt starv, har ein sjálvur kemur til at tilrættisleggja sín dagligdag. Harafturat hava kontór okkara allarhelst Føroya besta útsýni.

Lønin verður at avtala.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi áðrenn 5. september 2006.

**P/f Sandavágs Timburhandil**
Hillingatangi 8-12
FO-360 Sandavágur

Att: Albert Ari.

Um spurningar eru, kann ringjast á tlf. 533053.




**"Enniberg"**

Útferð til Enniberg hvønn dag kl. 15:00. (Vit sigla um bert <u>ein</u> møtir upp).
max. 25 ferðafólk.
Kostn. 250 kr./fólk.
Túralongd 2½ tími.

Ring: m/b Alpha Pilot
Telefon 220849

# Lesið Sosialin

# Koyri-kort?

Teoriskeiðið til persónbil, byrjar mánadagin **14. august kl. 17.00**

FØRARASETRIÐ
KOYRISKÚLI

**Stanley A. Olsen**
koyrilærari
**tel 21 10 99**

**John A. Christiansen**
koyrilærari
**tel 21 47 75**

**Jekaragøta 10 • Tórshavn**

# HANDILSLÆRLINGUR TIL THOMAS DAM ÍTRÓTT Í HAVN

Søkt verður eftir lærlingi til ítróttarhandil okkara í Havn at byrja skjótast tilber.
Starvið er fjølbroytt, spennandi og áhugavert fyri tann í dámar væl at umgangast viðskiftafólk.
Tað er eisini møguleiki fyri at luttaka á ítróttarmessu í Danmark.

Lærutíðin við HH er 2 ár, og vi FHS 3 ár. Í hesum tíðarskeiðnum skal næmingurin á skúla í Danmark 3 ferðir.

Vit vænta at tú ert fryntlig/ur, hevur góð samstarvsevnir, dugir væl at umgangast fólk og ikki bangin fyri at taka eina eyka hond í tá á stendur.

Um tú ert tann rætti kunnu vit bjóða tær eina spennandi lærutíð við nógvum avbjóðingum, samstundis sum møguleiki er fyri at halda fram í fyritøkuni eftir lokna lærutíð.

Umsóknir við viðmælum verða at senda til:

P/f Thomas Dam Ítróttur
Postmoga 268
FO-110 Tórshavn

**P/F THOMAS DAM**
ÍTRÓTTUR · NIELS FINSENSGØTA 5
POSTSMOGA 268 · 110 TÓRSHAVN · TEL 35 53 00

# TIL SØLU



RaðhúsTorkilsgøta 1, Hoyvík, til sølu um hóskandi boð fæst. Húsini liggja í barnavinarligum umhvørvi.
Byggiár 2001.
Húsini eru í 2 hæddum, í alt 160 m2.
Í niðaru hæddini eru gongd, kamar, baðirúm, hjúnarrúm við klædnarúmi, stova og køkur í einum og grovkøkur.
Á loftinum eru 2 stór kømur, uppihaldsrúm og baðirúm við brúsu.

**Tel. 320555 eftir kl. 16.00**

www.123hjemmeside.dk/torkilsgota1

Sosialurin -har tað hendir